


**FAKTA:** Mammudagurin byrjaði í 1872 í USA. Tað var høvundurin Julia Ward Howe, sum byrjaði, og dagurin hugskotið fó skjótt til onnur lond eisini.

# Mammudagurin 2011



ANNAR **SUNNUDAGUR** Í MAI ER **MAMMUDAGUR**. Í ÁR VERÐUR **DAGURIN** SOSTATT **8. MAI**. TÁ ER UPPLAGT AT STØÐGA Á OG **FORKELA MAMMU** SÍNA

**FAKTA:** Dagurin kom til Danmarkar í 1929, og var í fyrstuni grundalag undir innsavning til tær mammur, sum høvdu mist synir í krígnum.



**FAKTA:** Í Onglandi er siðurin eisini sera gamal, tá børn, sum vóru í arbeiði, sluppu heim at vitja mammu sína ein dag árliga. Tey, ið áttu eina mammu á lívi, bóru hvítar nellikur í knappholinum, meðan tey, hvørs mamma var deyð, bóru reyðar nellikur.



***FORKELA HANA:*** *Ber henni morgunmat upp á songina, fyll henni baðikarðið, bjóða henni út at eta døgverða ella gev henni blómur og sjokolátu. Møguleikarnir eru nógvir.*

***GÁVUKORT:*** *Send hana til fótarøkt, massagu, frisør ella í biograf. Møguleikarnir eru nógvir.*



**FAKTA:** Nú er annar sunnudagur í mai skýrdur at vera mammudagur.

***TEY BESTU MINNINI:*** *Ger eina myndabók av myndum og góðum minnum. Hon kann vera við framkallaðum myndum í myndabók ella digital sum diasshow á eini fløgu. Skriva fittar viðmerkingar til hvørja mynd.*

***HJÁLP VIÐ TÍ PRAKTISKA:*** *Nógvar mammur vildu fegnar sloppið undan nøkrum av mongu praktisku uppgávunum av og á. Dustsúgv fyri hana, tak uppvaskið, vaska bilin ella køliskápið, og bið hana seta seg í lenistólin við eini góðari bók ímeðan.*

## MINST TIL:

*Summar mammur leggja einki í at verða forkelaðar, tá tað verður dikterað av øðrum. Um mamma tín einki leggur í mammudagin, minst so til at forkela hana aðrar tíðir á árinum. Keyp henni blómur, ger henni døgverða ella bjóða henni út.*

